# Lokalsjónvarp um alt landið

Í kvøld fáa allir íslendingar møguleikan at síggja sendingarnar hjá sjónvarpsstøðini N4 Sjónvarp Norðurlands. Higartil hevur støðin bara sent á Norðurlandinum, men í kvøld fara sendingarnar um alt landið ígjøgnum eitt talgilt sendinet. N4 sendir tíðindi, tilfar um ymisk viðurskifti á Norðurlandinum, tónleikasendingar, mentanarsendingar og ymisk orðaskifti. N4 er fyrsta lokala sjónvarpsstøðin, sum fer at senda um alt landið.



*N4 hevur høvuðsstøð á Akureyri, men sæst nú um alt Ísland( Mynd: Morgunblaðið)*

# Danir liva longri

Eins og í hinum grannalondunum liva danir longri og longri. Tey nýggjastu hagtølini vísa, at nú liva danskir menn 75,9 ár og kvinnurnar 80,5 ár í meðal. Gongdin er, at munurin ímillum livitíðina hjá teimum báðum kynunum minkar í hvørjum. Eitt nú livdu kvinnurnar næstan seks ár longri enn menninir í 1987, men nú er munurin 4,53 ár. Men hagtølini vísa eisini, at danir liva framvegis stytri enn fólk í flestu londum í Vesturevropa.




*- Vit hava fingið at vitað úr Fíggjarmálaráðnum, at vit koma ikki longur lønarliga, so leingi vit eru limir í Havnar Arbeiðsmannafelag. Hetta var orsøkin til, at vit tóku stigið og meldaðu okkum inn í Starvsmannafelagið, sigur Asbjørn Knudsen, talsmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

men tá er munurin á lægstu lønini og hægstu neyvan meira enn stívliga 2.000 krónur.

- Tá ið vit verða tilkallaðir eftir vanliga arbeiðstíð, geva tríggir teir fyrstu tímarnir 50% yvirtíð og tann fjórði tímin 100% yvirtíð. Vit kunnu soleiðis siga, at ein partur av okkara løn – tað, sum ger, at vit yvirhøvur kunnu røkja okkara fíggjarligu skyldur – hongur neyvt saman við, um okkurt er at gera ella ikki. Vit halda tað bara vera ov galið, at okkara inntøkugrundarlag skal vera tengt at, um fólk gerast sjúk, eru fyri óhappum – ella í aðrar mátar hava brúk fyri sjúkrabili ella ikki, sigur talsmaðurin.

Síðan nýggja kommunulæknatænastan kom í gildi, hevur sambært talsmanninum verið heldur minni at gjørt í Eysturoy.

## Ov lítil virðing

Asbjørn heldur, at lønarviðurskiftini hjá teimum, sum røkja sjúkraflutningsuppgávur, eru út av lagi vánalig.

- Eg haldi ikki, at okkara fólk í nóg stóran mun verða vird fyri tað, tey gera og tær uppgávur, sum lagdar verða á okkum. Hesi fimm árini, eg havi verið í hesum starvi, eru nógvar broytingar farnar fram, og stór ábyrgd er løgd á okkum við viðgerð á staðnum og í sjúkrabili eins og við heilivági. Haraftrat skulu frágreiðingar skrivast um hvørja einstaka ferð og hvønn einstakan sjúkling. Verður sjúklingur koyrdur á skaðastovuna, skal læknin, sum tekur ímóti, hava eina slíka frágreiðing.

Hann vísir á, at rættiliga fastar mannagongdir eru, tá ið farið verður út til uppgávur.

- Í Eysturoynni hava vit ta skipan, at annar í sjúkrabilinum er viðgerðari og hin er atstøðingur, har atstøðingurin er tann, sum koyrir bilin, meðan viðgerarin er tann, sum er hjá sjúklinginum og gevur hjálpina – á staðnum og í bilinum. Vit skiftast soleiðis annan hvønn túr. Hetta er ein skipan, sum tryggjar, at liðið, sum fer út, í hvørjum einstøkum føri kennir sína uppgávu.

Asbjørn sigur, at liðið, sum fer út til uppgávur, eisini veit, hvør av teimum báðum hevur evstu ábyrgd, tá ið týðandi avgerðir skulu takast.

- Men tíbetur ert tú ongantíð einsamallur um avgerðina, leggur hann aftrat.

## Samráðingarrættur

Tað, sum serliga kennist hugstoytt hjá teimum, sum fóru úr Havnar Arbeiðsmannafelag og gjørdust limir í Starvsmannafelagnum, er, at samráðingarrætturin á økinum framvegis liggur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

- Vit hava fingið at vitað úr Fíggjarmálaráðnum, at vit koma ikki longur lønarliga, so leingi vit eru limir í HavnarArbeiðsmannafelag. Hetta var orsøkin til, at vit tóku stigið og meldaðu okkum inn í Starvsmannafelagið. Eg havi sjálvur verið til samráðingar í Fíggjarmálaráðnum saman við Havnar Arbeiðsmannafelag, og har hevur verið sagt, at tey kunnu ikki løna einum bólki av arbeiðanum hægri enn einum øðrum bólki.

Asbjørn sigur, at tað vóru 48 fyrrverandi limir í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum meldaðu seg inn í Starvsmannafelagið, meðan 7 aktivir limir framvegis eru í Havnar Arbeiðsmannafelag.

- Tað, sum vit halda vera sera órættvíst, er, at Starvsmannafelagið ikki kann fáa samráðingarrættin hjá okkum, nú eitt so stórt tal av okkum eru limir í felagnum. Hvar er demokratiið, tá ið 7 hava samráðingarrættin fyri okkum øll, kunnu vit spyrja. Á tingi ræður ein meiriluti upp á 17, men hetta er eftir øllum at døma ikki galdandi á okkara øki.

Talsmaðurin vísir á, at tey 48, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, tvær ferðir hava boðað frá arbeiðssteðgi, men fasti gerðarrætturin hevur báðu ferð sagt, at tiltakið ikki er lógligt, soleingi sáttmáli er á økinum, og tí hevur eingin arbeiðssteðgur verið.

- Men hvussu skal tað vera, tá ið ein av limunum í gerðarrættinum er Vígdis Johannesen, formaður í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Tað undrar meg, at hon ikki heldur seg vera ógegnigan í slíkum máli, sum snýr seg um eitt annað arbeiðarafelag.

Asbjørn Knudsen vísir á, at sáttmálin, sum Havnar Arbeiðsmannafelag hevur við Fíggjarmálaráðið fyri sínar limir, ið eftir eru innan sjúkraflutningsøkið, bevíst ikki er uppsagdur.

- Vit kenna okkum tí rættiliga bóndafangað undir verandi umstøðum, sigur talsmaðurin.